Dagf. 18. juni 2024
HMR j. nr. 24/14773-4

Margit Stóra
landsstýriskvinna

Svar

upp á

Fyrispurning nr. 52-128/2023 eftir § 52 a í tingskipanini um skanning av prostatasjúklingum, frá Árna Skaale, løgtingsmanni

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. Hvussu nógv kostar tað at senda 28 sjúklingar til Danmarkar til skanningar fyri prostata?

2. Hvussu nógv hevði tað kostað at gjørt hesar skanningarnar í Føroyum?

3. Eru fyrireikingarnar, í samband við at ein skannari er settur upp á Klaksvíkar sjúkrahúsi, gjørdar á nøktandi hátt?

4. Hvør er orsøkin til, at hesir 28 sjúklingarnir ikki kunnu skannast í Føroyum?

Svar:

Til spurning 1 og 2

Tað er vert at nevna, at tað í verandi støðu ikki er møguligt at skanna teir 28 sjúklingarnar í Føroyum (sí svarið til spurning 4). Tí eru tølini niðanfyri sett upp út frá tí fyritreyt, at tað var møguligt at skanna sjúklingarnar í Føroyum.

Tann metti meirkostnaðurin av at senda 28 sjúklingar uttanlands (um tað bar til at skanna fyri prostata á Klaksvíkar sjúkrahúsi) er sambært Sjúkrahúsverkinum umleið hesin:

Kostnaðurin fyri 28 sjúklingar til Danmarkar (Aalborg) er:	Kr. 229.908
Kostnaðurin fyri 28 sjúklingar til Klaksvíkar er:	Kr. 70.308
Munur:	Kr. 159.600

Tølini byggja á útrokningar frá Kliniska Stápi – Uttanlandstænastuni í Sjúkrahúsverkinum:

					Kostnaður pr. viðgerð	Árligur kostnaður
ÁR	**Viðgerð**	**Tal av sjúkl.**			**v/fylgjara**	**v/ fylgjara**
2024	MR skanning	28	Viðgerð (DRG prísur)*		2.511	70308
			Flogferð	sjúklingur	4.200	117600
			Flutningur annars		1.000	28000
			Uppihald	sjúklingur	500	14000
					8.211	**229.908**

* DRG stendur fyri “Diagnosis Related Group”. DRG-prísir verða vanliga nýttir til at seta prís á ymiskar veitingar í sjúkrahúsverkinum.

Talvan omanfyri vísir kostnaðin av at senda sjúklingar til MR-skanning í Aalborg. Hvør skanning kostar sambært hesum umleið 8.211 kr., íroknað ferðing og uppihald, har gist verður eina nátt á sjúklingahotelli í Aalborg.

Um 28 sjúklingar verða ávístir til MR-skanning í Aalborg, verður kostnaðurin sostatt góðar 230 tús. kr., við omanfyrinevndu fortreytum.

Undir vanligum umstøðum hevur sjúklingurin ikki fylgjara við, tá ið ávíst verður til MR-skanning í Danmark. Fyrivarni skal takast fyri, at tað í einstøkum førum er neyðugt á ávísa fylgjara við. Tá skulu ferða- og uppihaldsútreiðslur leggjast afturat omanfyrinevnda kostnað.

Kostnaður í Føroyum, um kostnaðurin svarar til DRG-prís:

Viðgerð	**Tal av sjúkl.**		**Kostnaður pr. viðgerð** (DKK)	**Kostnaður fyri 28 sjúklingar (DKK)**
MR scanning	28	Viðgerð (DRG-prísur)	2.511	70308

Prísurin á eini MR-skanning av prostata í Føroyum kann gerst dýrari enn ásetti DRG-prísurin, eftirsum talið av skanningum er lágt, og tað vanliga gerst dýrari at tryggja førleikar v.m. í einum lítlum sjúkrahúsverki.

Til spurning 3 og 4

Sjúkrahúsverkið hevur gjørt eina ætlan fyri íverksetanina og í hesum sambandi eisini eina tíðarætlan. Ætlanin var klár í byrjanini av 2024, og tað er hendan ætlanin sum verður fylgd.

Ein 3T MR-skannari hevur framkomna tøkni, sum Sjúkrahúsverkið ikki hevur havt áður. Sostatt er neyðugt at tryggja, at radiografarnir í MR-toyminum fáa upplæring og royndir, og tað verður m.a. gjørt við at gera kanningar, av so sum heila, liðum og ryggi. Hetta eru kanningar, sum frammanundan verða gjørdar í Sjúkrahúsverkinum á sonevndum 1,5T MR-skannara.

Prostata kanning er kompleks á ymiskan hátt, sum umframt upplæring og royndir, eisini krevur førleikamenning av starvsfólki og avtalu við røntgendeild uttanlands, sum m.a. kann tulka tílíkar myndir. Sambært tíðarætlanini hjá Sjúkrahúsverkinum fyri íverksetanina av MR-toyminum og 3T MR skannaranum, sum var klár í byrjanini av 2024, verða hesi viðurskifti komin uppá plass og klárt er at gera prostata kanningar í september ella oktober í ár.

Heilsumálaráðið, 18. juni 2024

Margit Stóra
landsstýriskvinna